8. sending, Okkara kokkar

## Jákupsskeljar í kryddlaka

5 dl. av olivinolju
2 dl. av hvítvíni
0,5 dl. av balsamicoediki
100 gr. av gularótum
50 gr. av purrum
Purleyk
Salt og pipar
300 gr. av jákupsskeljum

*Soleiðis gert tú:*

1. Koyr olivinolju, hvítvín og balsamico í eina skál
2. Karva gularøtur og purrur heilt smátt
3. Koyr purleykin í
4. Rør hetta saman og koyr síðani jákupsskeljarnar í
5. Lat standa kalt í uml. 24 tímar.

## Jákupsskeljagrýta

50 gr. av piparfruktum í øllum litum
50 gr. av purrum
100 gr. av soppum
50 gr. av skalottuleyki
2 tomatir
1 gularót
50 gr. av kryddurtum – nýggjar ella turkaðar
2,5 dl. av róma
300 gr. av jákupsskeljum
Salt og pipar

*Soleiðis gert tú:*

6. Sker alt grønmetið í hóskandi bitar og brúnka á pannu
7. Stroy róman omaná og lat smákóka til rómin er tjúknaður
8. Koyr síðani jákupsskeljarnar í – tær mugu ikki kóka.

## Øða í Nori - tara

300 gr. av øðu
50 gr. av soppum
50 gr. av piparfrukt
50 gr. av minimais
50 gr. av leyki
2 bløð av tara
200 gr. av smyrjiosti – naturel
3 dl. av róma

*Soleiðis gert tú:*
Sker grønmetið í hóskandi bitar
og steik teir á pannu.
Koyr róman í og lat hann smákóka
til hann er næstan kókaður burtur
Legg nori-tara og smyr ostin á.
Legg síðani grønmetið á
Rulla saman og set í ovnin beint undan
borðreiðingini í umleið 5 min. á 120 stigum.

## Gratinerað øða

300 gr. av øðu
1 gularót
1 piparfrugt
100 gr, av snerktum beykoni
3 tomatir
200 gr. av osti, sum kann bráðnast
Estragon – nýtt ella turkað
Salt og pipar

*Soleiðis gert tú:*
Sker øðuna og grønmetið í hóskandi bitar
og steik á pannu
Krydda við esdragon, salti og pipari
Legg so alt í eitt eldfast fat
Koyr beykon og ost omaná
og lat baka í umleið 10. min. á 220 stigum.

**VIÐMERKINGAR**

# Toskurin & Vit

**Johan Mortensen**



Í farnu viku frættist at EU hevur ætlanir um næsta ár at minka Norðursjóar kvotuna av toski, hvítingi og haki við 75% eftir at menn eru vornir varir við, at hesir stovnar ongantíð hava verið so illa fyri síðani 1963. EU mynduleikarnir siga at verða ikki tiltøk beinanvegin sett í verk verður heilt galið við hesum fiskiskapi.

Í ár varð toskakvotan reducerað við 40% niður til 80.000 tons. I seinna helmingi av 1980 vóru umleið 300.000 tons av toski veidd í Norðsjónum.

Fiskiídnaðurin í EU mótmælir harðliga meira niðurskurði og fara nógv virkir og arbeiðspláss at kenna sviðan av hesum tiltøkum. Bretskir EU andstøðingar mæla til at Bretland fer aftur sjálvt at umsita fiskiskapin heldur enn at lata Spaniólar veiða tað sum teir halda er bretskur fiskur.

Í byrjanini av 1990 komu 80% av tí veidda fiskinum í EU sjógvi úr gomlum Bretskum øki ! Tað er væl skiljandi at Bretar eru argir inn á hetta vanbýti.

Nøkur tøl sum kanska hava áhuga :

- Um ár 1900 hevði Bretland nógvar 100.000 fiskimenn.
- Um ár 1950 eru framvegis einir 48.000 bretskir fiskimenn.
- Í løtuni er talið minkað til 16.000 mans. Við kvotuskerjingunum minkar hetta tal við einum 50%.
- Í árunum 1992 til 1999 fór Bretski fiskiflotin úr 11.561 fiskiførum niður til 7.448 og læðkar teirra veiða støðugt við umleið 20% um mánaðin.

Orsøkin til hesa ringu støðu er sjálvandi ov nógv veiða og sera framkomin teknikkur. Eisini verður hildið at »vakstrahúsárinið« ger seg meira og meira galdandi og at Norðsjógvurin er nú so heitur at toskayngul hevur torført við at koma undan.

Henda ólukkuliga støðan kemur at viðføra at Føroyar fáa væl hægri prísar fyri okkara útflutning.

Eisni sýnir hetta at tað ber til at oyða fiskastovnarnar. Føroyingar eiga at fara enn betur um okkara fiskiskap og umsita stovnarnar samvitskufult. Partroling eigur at verða bannað alt fyri eitt og húkaveiða stuðlað burturav.

Meira eftirlit eigur at verða við okkara útflutningsfeløgum sum eg haldi eru alt ov nógv í tali og yvirhøvur ov lítið professionel og vanabundin. Tað átti ikki at verði meira enn einar 10 løgildaðar fiskasølur!

Tað eigur at verða bannað at útflyta rundan, óviðgjørdan fisk.

Eisini er hetta eitt sera klárt varskóð til Føroyar um at vit skulu halda okkum langt uttan fyri EU og tess fiskiflotar. Tað er løgið at tað framvegis finnast so forstokkaðir føroyingar sum eru fyri limaskapi í hesum felagsskapi sum ikki er okkara. Føroysku fiskastovnarir eru meira verdur enn at vit fáa nøkur fá kilo av rækjum fyri minni toll inn í EU.

EU hevur brúk fyri okkara fiski, um vit hava brúk fyri EU kann tjakast um!

# Samstarvsvilji Sjálvstýrisfloksins



**Sámal Petur í Grund**
*løgtingsmaður, formaður í tingbólki Sjálvstýrisfloksins*

### Viðmerking til samrøðu við Jóannes Eidesgaard í Sosialinum 1. desembur

Sosialurin hevur fríggjadagin 1. desembur samrøðu við formann Javnaðarfloksins, Jóannes Eidesgaard, hvar spurningurin um eitt møguligt samstarv millum Javnaðarflokkin og Sjálvstýrisflokkin, eftir eitt komandi løgtingsval, verður viðgjørdur.

Jóannes Eidesgaard fær tað til, at tað ikki er samsvar millum tað aktivu politikarar sjálvstýrisfloksins vilja og tað veljarar floksins vilja. Hetta við grundarlagi í eini veljarakanning gjørd í novembur mánaða.

Visandi til omanfyrinevndu veljarakanning, sigur Jóannes Eidesgaard, at veljarar Sjálvstýrisfloksins helst vilja, at flokkurin samstarvar við Fólkaflokkin og Javnaðarflokkin.

### Sannleiki við modifikatiónum

Sagt verður viðhvørt um okkurt ivasamt sum liggur til grund fyri onkrum, at tað er ein sannleiki við modifikatiónum. Soleiðis tykir mær at grundarlagið undir meting Jóannesar er háttað.

Hetta, tí at veljarar Sjálvstýrisfloksins uppá fyrispurning um hvønn teir helst vilja, at flokkur teirra samstarvar við, svara soleiðis: 37% fyri Fólkaflokkinum og 16,7% í part til Tjóðveldisflokkin og Javnaðarflokkin.

Tey 41% sum umrødd verða í omanfyrinevndu samrøðu, er eitt svar frá veljarum floksins uppá hvønn teir halda best kunna loysa spurningin um ríkisrættarligu støðuna.

Tað er ikki vist, at tað er samanfall millum tað, sum veljarar floksins halda um loysn á ríkisrættarligu støðuni, og so hvønn veljararnir helst vilja at flokkurin samstarvar við.

Hetta sjónarmið verður undirbygt við støði í einum øðrum spurningi í somu veljarakanning. Nevniliga spurninginum um vit skulu hava nýval. Henda spurning svara 87,5% av veljararum floksins nei til.

Hetta kann líka so væl takast sum tekin um, at veljarar Sjálvstýrisfloksins eru nøgdir við tað samstarv Sjálvstýrisflokkurin í løtuni er í.

### Samstarv við Javnaðarflokkin

Eisini førir Jóannes Eidesgaard fram, at tað var Sjálvstýrisflokkurin íð forðaði Javnaðarflokkinum í at koma í samgongu seinast. Hetta sjónarmið kennist eg ikki við og eigi ikki lut í, so er tað sagt.

Annars skal Jóannes hava takk fyri positivu støðu sína til eitt møguligt samstarv millum Javnaðarflokkin og Sjálvstýrisflokkin, eftir eitt komandi løgtingsval.

Verandi samgonguskjal er bert galdandi hesa løgtingssetuna og er Sjálvstýrisflokkurin tilreiðar at taka støðuna upp til viðgerðar eftir eitt løgtingsval, og tað uttan nakrar sum helst fordómar.



Til Føroya Løgting

# Viðvíkjandi íbúðartørvinum hjá fólkum, ið hava brek



Undirritaðu feløg – Javni og Sinnisbati, vilja við hesum venda okkum til avvarðandi landsins myndugleikar viðvíkjandi íbúðartørvinum hjá teimum bólkum, sum vit varða av, – nevniliga teimum fólkum, ið eru menningartarnað og sálarliga sjúk.

Vit vilja fyrst og fremst vísa til hjáløgdu skjøl, sum hvør í sínum lagi lýsa tørvin á økinum. Afturat hesum vilja vit føra fram:

At vit ynskja ein miðvísan almannan bústaðarpolitikk, fyri fólk við breki.

Vit meta tað vera sera umráðandi, at almennu myndugleikarnir í Føroyum seta út í kortið ein almannan politikk á hesum øki.

Tað er skyldan hjá einum og hvørjum samfelag so frægt, sum tað er gjørligt at tryggja øllum borgarum landsins somu íbúðarmøguleikar.

Tá talan er um hesar nevndu bólkar krevst ein serlig tillaging frá øllum.

Javni og Sinnisbati – sum varða av teimum, ið eru menningartarnað og sálarliga sjúk hava gjørt og vilja fegin gera okkara part, men hetta okkara virksemi kann geva best møguligt úrslit, uttan at hetta verður gjørt, sum ein partur av einum miðvísum politikki á økinum, – sum tað er ábyrgdin hjá politisku myndugleikunum at skipa fyri.

Vit meta tað fyrst og fremst at vera umráðandi, at politikkurin hevur til endamáls, at flest møgulig í størst møguligan mun kunnu sleppa at hava eina tilveru uttanfyri almenna sjúkrahús- og røktarumhvørvið.

*Tørvurin á økinum kann í stuttum gerast upp í fýra stigum:*

1. Neyðugt er við stovnum har tey brekaðu, ið hava tørv á tí, kunnu verða »slúsað« út til eina vanliga tilveru. Hesir stovnar skulu tískil metast at vera »eitt stig á leiðini«, har viðkomandi kunnu vera eina tíð, meðan tey verða lagað til vanligu tilveruna.
2. Neyðugt er við stovnum til tey, sum eru ov væl fyri til at vera í almanna »systeminum«, men sum tó ikki eru nóg birg til at klára seg uttan røkt. Her eiga at vera møguleikar, eftir tørvinum hjá tí einstaka menniskjanum, so sum sambýlir ella røktarheim fyri sálarliga sjúk.
3. Aftur hesum er neyðugt at útvega íbúðir til tey, sum kunnu klára seg einsamøll, men sum tó kunnu hava trupulleikar við at útvega sær íbúð á vanliga íbúðarmarknaðinum.
4. Tann í hjáløgdu skjølum vísti tørvurin á íbúðum ella sambýlum talar fyri seg, hvønn tørv sum fólk ið menningartarnað og onnur við serligum tørvi hava. Sum ein meginregla eiga vit at siga, at ein bústaður til fólk, ið hava brek eigur at vera á sama støði, sum onnur fólk í samfelagnum hava, men eisini eigur bústaðurin at vera tillagaður til tann tørv, sum tann einstaki hevur.

### Ódýrari skipan

Tað er greitt, at hetta mál eisini hevur eina fíggjarliga síðu. Men hon er ikki so ræðandi, sum ein kundi hugsað sær. Fyrst er at siga, at her er peningur at spara. Tað er greitt, at tað er munandi bíligari at lata fólk búgva á stovnum uttanfyri almennu skipanina, enn at tey eru innløgd á sjúkrahúsið ella almennu røktarskipanina.

At útvega stovnar vil í fyrsta umfari kosta pening. Men sum tað verður víst í hjáløgdu skjølum eru ymiskir fíggjarmøguleikar, ið gera, at meira fæst fyri eina játtan á fíggjarlógini enn fólk annars kann ímynda sær.

Vit vilja fegin ásanna, at í teirri støðu sum vit vóru í fyrst í 90 unum, máttu vit lata okkum lynda, at tað varð spart á hesum øki sum á øðrum økjum.

Men nú er fíggjarliga støðan broytt.

Enn hava vit ikki merkt nakað til hetta á okkara øki

### Áheitan!

Javni og Sinnisbati vilja við hesum venda okkum til allar almennar myndugleikar við inniligari áheitan, um at tað verður sett ein munandi peningaupphædd á fíggjarlógina í ár 2001.

Okkum er altíð vístur ein góður vilji frá politikkarunum, men tann góði viljin einsamallur er ikki nóg mikið – tað er nú einaferð pengum vit hava tørv á!

Feløgini eri til eina og hvørja tíð til reiðar at greiða nærri frá okkara sjónarmiðum og grundgevingum.

Tí vóna vit at frætta skjótt aftur.

Virðingarmest
**Javni**
**Diana í Puntabyrgi, form.**
**Sinnisbati**
**Svenning á Lofti, form.**

# Vaksandi fiskivinnusamstarv millum Føroyar og Grønland

Árligu fiskivinnusamráðingarnar millum Føroyar og Grønland vóru í Keypmannahavn í døgunum 27.-28. november 2000.

Partarnir endurskoðaðu fiskiveiðiavtaluna fyri 2000 og komu ásamt um, at fyri 2001 kunnu føroysk skip fiska 3.400 tons av uppsjóvar kongafiski burturav felags Føroyar/Grønland NEAFC-kvotuni í Irmingarhavinum ella í grønlendskum sjógvi. Grønlendsk skip kunnu fiska 2000 tons av norðhavssild burturav føroysku strandalanda kvotuni í føroyskum sjógvi ella í altjóða øki. Henda nøgd kann eisini verða fiskað við Jan Mayen, um Noreg og Grønland semjast um tað, og verða avreidd í Føroyum.

Partarnir vóru samdir at halda áfram royndarveiðu í ávikavist grønlendskum og føroyskum sjóøki soleiðis, at føroysk skip kunnu fiska við troli ella línu 150 tons av svartkalva í Vesturgrønlandi norðanfyri 68 stig N. Eisini kunnu upp til 3 skip í senn fiska við troli ella línu eftir toski, brosmu og steinbíti í Eysturgrønlandi í upp til 100 fiskidagar tilsamans. Hjáveiðan av kalva og svartkalva er sett til 100 tons tilsamans.

Ein grønlendskur trolari kann fiska upp til 250 tons av botnfiski í føroyskum sjógvi á uttaru fiskidagaleiðini. Hjáveiðan av toski og hýsu kann í mesta lagi verða 30% av botnfiskaveiðuni. Eisini kann eitt grønlendskt skip royndarveiða eftir krabba á ytru fiskidagaleiðini. Grønland fær 300 tons av makreli í føroyskum sjógvi.

Partarnir komu ásamt um, at tað aftur í 2001 skal verða møguligt at býta fiskidagar eftir rækjum á NAFO-økinum, og at um Grønland hevur lodnu eftir í Eysturgrønlandi, so skal tað verða møguligt hjá føroyskum skipum at keypa burturav hesi. Eisini kunnu føroysk skip fiska 50% av teirra íslendsku lodnukvotu í grønlendskum sjógvi.

Eins og undanfarna ár skal tað verða møguligt hjá føroyskum verksmiðjuskipum at taka ímóti fiski í Grønlandi, um toskafiskiskapurin skuldi byrja aftur, og um grønlendsk virkir ikki fáa tikið ímóti.

Partarnir eru samdir um at virka fyri vaksandi fiskivinnusamstarvi í vinnuni hjá báðum londunum.

Partarnir umrøddu samstarvið í NAFO, NEAFC og í norðurlanda høpi. Eisini varð ætlanin um eina trílandaavtalu millum Føroyar-Grønland og Ísland umrødd, herundir at halda áfram við felags kanningum av kongafiskinum í Irmingarhavinum.

9. sending, Okkara kokkar

## Dampkókaður ella stoktur hvítingur

*við dampkókaðum ella stoktum jákupsskeljum – reyðvínssmør afturvið*

*Hetta skalt tú brúka:*
400 gr. av hvítingi
200 gr. av jákupsskeljum
4 dl. av reyðvíni
250 gr. av smøri
1 leyk
2 dl. av róma
Salt og pipar

*Soleiðis gert tú:*

1. Loyp ella steik fiskin
2. Sker leykin smátt og koyr hann í grýtu
3. Hita upp og stoyt reyðvínið í.
4. Lat hetta kóka niður í eina helvt – stoyt síðani róman í
5. Rør síðani smørið varisliga í
6. Sósin má hvørki kóka, meðan smørið verður rørt í, ella aftaná.

Dampkóka ella steik jákupsskeljarnar
og borðreið við rísi ella eplum.